# HEILSANIR



**Góða Beinta**
Hjartaliga tillukku við 6 ára føðingardegnum í dag. Hopi at tú hevur bakað nógvar góðar køkur at bjóða okkum.
**Heilsan Kristina, Birita og Súsan**



**Góði Hassadi**
Hjartaliga tillukku við 25 ára degnum 8. mars. Alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja mamma og babba**



**Góða Hanna**
Vit vilja av hjarta takka tær fyri tær mongu góðu ferðir vit hava búð á Hotel Hjelm. Hjartaliga tillukku við degnum 7. mars. Hvør veit kanska síggjst vit skjótt. Alt gott og harrans signing ynskja vit tykkum. Bestu heilsanir við sálm. 121
**Systrarnar „Madsen“**



**Elskaða mamma**
Babba og eg vilja ynskja tær hjartaliga tillukku við føðingardegnum, sum var fríggjadagin. Takk fyri, at tú ert alt tað, sum tú ert fyri meg
**Niels Áki**



**Góða Beinta**
Hjartaliga tillukku við 6 ára føðingardegnum kvinnudagin.
**Ynskja omma og abbi á Landavegnum**



**Góði Bjarni**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við føðingardegnum og alt tað besta í framtíðini.
**Jóna, Hans og Ellen**



**Góða elskaði Agnar**
Tillukku við 5 ára degnum 24. febr. Hetta var ein góður túrur til Hvannhaga, men vatnið var nakað kalt til at vassa.
**Heilsan mamma, pabba og Elin Kristina**



**Góða Jonna**
Vit ynskja tær Hjartaliga tillukku við fimti ára degnum tann 5. mars. Gleða okkum til í dag.
**Kvinnurnar í H.F.**



**Góða stórasystir**
Tillukku og alt tað besta.
**„lítlibeiggi“ Eyðun**



**Góðu elskaðu Brynhild og Marta**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum 5. og 7. mars. Muss og klemm frá
**ommu í Danmark**



**Góði Hassadi**
Hjartaliga tillukku við 25 ára degnum 8. mars. Var tað ikki gott at tú fekst eina lítlasystir, so at tú kundi læra teg :o)
**Bestu heilsanir frá Vár**



**Góði havnarmamba**
Hjartaliga tillukku við 25 ára degnum 8. mars. Eg gleði meg til tú kemur til Klaksvíkar at vitja okkum.
**Heilsan lítlibeiggi**



**Góða Durita**
Tillukku við 19 árunum. Gott at hava teg heima aftur. Jesus pápi veri hjá tær.
**Mamma og babba**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á middegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.......................................................................
...................................................................................
...................................................................................
...................................................................................
...................................................................................
...................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: .........................................................................
Bústaður: ....................................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:

**Sosialurin**

Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«



# TILTØK

**Gudstænastur 1. sunnudag í føstu**
*Funningsfjørður:* kl. 12, familjugudst. Uni Næs
*Hósvík:* kl. 12, altarg., Inga Poulsen Dam
*Hvalvík:* kl. 12, Petur M. Rasmussen
*Rituvík:* kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalíð
*Eiði:* kl. 11.40 skriftamál, kl. 12 messa,
*Norðskála:* kl. 17 messa, Emil Olsen
*Æðuvík:* kl. 11, Martin R. Jacobsen
*Vesturkirkjan:* kl. 11, familjugudstænasta, Heri Joensen. Barnakórið í Meinigheitshúsinum lukur
*Argir:* kl. 11, familjugudstænasta, Bergur D. Joensen
*Kirkjubøur:* kl. 12.15, altarg., Heri Joensen
*Skála:* kl. 11, Jógvan Fríðriksson
*Sørvágur:* kl. 12, David Johannesen
*Viðareiði:* kl. 12, Elsa Funding og konfirmantar
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sverri Steinhólm
*Nólsoy:* kl. 12, Erland Beder
*Kaldbak:* kl. 12, Sonja Klein
*Klaksvíkar sjúkrahús:* kl. 10,
*Christianskirkjan:* kl. 11, Hans Eiler Hammer
*Árnafjørður:* kl. 11, altarg.,
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Niels Pauli Danielsen
*Haldórsvík:* kl. 12, Bjarni Bæk og Mogens Tilsted Christensen
*Hellur:* kl. 12, Hans J. Joensen
*Vágur:* kl. 11 Kjartan Mørkøre
*Hov:* kl. 12, Ólavur Rasmussen

**Sjómanskvinnuringurin í Havn**
kemur saman á Sjómansheiminum mánakvøldið kl. 19.30.

**Losjan í Havn**
Mánakvøldið 10. mars kl. 20.00 verður losjufundur, Magnhild og Piddi greiða frá ráðsfundi í Keypmannahavn í vetur.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Minnismáltíð Harrans – ímeðan er barnaansing, kl. 12 sunnudagsskúli – samstundis er møti, har Gunnar Nielsen talar.
Mánadagin kl. 19 er ungdómstiltak (fyri 5.-10. fl.)
Heimasíða www.hebron.fo

**Hugnakvøld**
við filmi fyri ung verður í Argja skúla fríggjakvøldið 7. mars kl. 20. Aftaná verður okkurt ábit.
Leygarkvøldið kl. 20 verður Evangel. møti í Argja skúla. Nógvur sangur verður at hoyra. Aftaná verður kaffi. Øll eru hjartaliga vælkomin. Petur Zakariasen og Vagn í Geil.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ Hendrik T. Olsen, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Fríggjadagin Alheims kvinnubønardagur í Katólsku kirkjuni kl. 19.30.
Major Turid Gamst talar á møtunum sunnudagin. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Lívdin**
Í Hoyvíkar skúla verður ungdómstiltak leygarkvøldið kl. 20.30, við sangi, samfelagið og Jógvan Z. talar um: Hvar er markið? Hvat kann eg gera, og hvat kann eg gera sum ein trúgvandi?
Sunnumorgunin kl. 10.30 familjumøti, Absalon Áargarð talar um: Hvat segði Jesus um pening? og tilbiðjanarmøti kl. 12, talar Zacharias Z. um: Ávøkstur í lívi hins trúgvandi. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum.
Drekkamunnur er millum møtini.
Mánakvøldið kl. 20 Gentubólkurin møtist hjá Sennøvu, Gundadalsvegur 43.
Týskvøldið Húsbólkar
Heimasíðan: www.livdin.fo

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Mikukvøldið kl. 20 Húsmøti hjá Mariann og Jákup Eli Jacobsen, Ovaragøta 66, Hoyvík.
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 ATAP Barnaklubbur.
Leygarmorgunin kl. 10 hittast menninir til morgunkaffi o.a.
Sunnudagin kl. 17 Møti og sunnudagsskúli. Tummas Jacobsen talar. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Katólska kirkjan**
Leygardag kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 hámessa í Mariukirkjuni. Sunnudagsskúli kl. 14.

**Meinigheitshúsið**
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorhugni fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Ytrimissiónsmøti við Herluf Heinesen og Inger Nørgaard.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Halda mánaðarmøtini fram við evninum: Hin stóri hirðin.
Týsdagin kl. 17 Frítíðararbeiði.
Mikudagin kl. 17 AWANA, kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Sunnudagin kl. 15 í KFUK: KFUK-fundur.
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Elsu Jacobsen, trúboðara.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børnini.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti við Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Sangmøti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
Møtiskráin hja Filadelfia sæst á www.filadelfia.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Leygardagin kl. 14 Bíbliutími, evni: Tíðarinnar tekin í okkara tíð – 7 ára trongdin, hjá J. V. Áarrás 9, Argir.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

**Royndarhúsið í Nólsoy**
Leygardagin kl. 16 verður Barnamøti og kl. 20 Evangel. møti.
Sunnudagin kl. 16 Evangel. møti. Herman og Gigga syngja.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting, kl. 18 Møti í Evangeliihúsinum.
Mánadagin kl. 20 Húsmøti hjá Jón og Binu.
Telefonandaktin 424741.

**Missiónsvika í Hósvíkar kirkju**
Leygarkvøldið kl. 20 Møti við Niels J. Nielsen, Jónhilda og Gullak Hansen syngja.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Regin Høgnesen, Essa Jacobsen syngur. Innsavnan til H. M. Drekkamuður verður hvørt kvøld eftir møtini. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Páskastevnan 2003**
í Ítróttarhøllini á Skála. Høvuðstalarar á stevnuni verða Hilda og Erik J. Bedsvaag, trúboðarar í Kenja og Envald Flåten, Noreg.

**Missiónshúsið í Oyndarfirði**
Sunnudagin kl. 16.30 Møti við John Myllhamar, trúboðara o.ø.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sjómansmøti verður sunnudagin kl. 19 við Torleifi Johannesen, sjómanstrúboðara. Filmur frá sjólívinum verður sýndur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan**
Leygarkvøldið kl. 21, Opið hús við Leif Høj.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting, kl. 17 Familjumøti. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við Pola Jacobsen.
Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti.

**Tofta missiónshús**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20, strandingar luttaka. Vælkomin.

**Nebo, Toftir**
Sunnudagin 9. mars verður Evangel. fundur á Svangaskarði. Levi Joensen og aðrir tala. Sangkórið í Betesda syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli í Thabor og á Kambsdali og Møti kl. 18.

**Evangel. møti**
verður í hølunum hjá Arbeiðarafelagnum »Hæddini« Saltangará hósdagin 13. mars kl. 20.00. Øll eru hjartaliga vælkomin!

**Gøta**
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20. Jógvan Højgaard luttekur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjadagin kl. 19.30 Altjóða kvinnubønardagur.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Torbjørn Láadal o.fl.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti.

**Missiónsvika í Æðuvík**
vikuskiftið 7.-9. mars við hesum møtum:
Fríggjakvøldið kl. 20 Martin R. Jacobsen.
Leygarkvøldið kl. 20 Hans Pauli Højgaard.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta við Martin R. Jacobsen og kl. 19 Møti við John Myllhamar.

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 er Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli og kl. 18 Møti við Sannu Hammer. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 11 Barnaarbeiði (3) 4 til 6 ár, kl. 14 Barnaarbeiði 1., 2. og 3. flokkur, kl. 16 Barnaarbeiði 4., 5. og 6. flokkur.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangeliskt møti. Verið hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og lovsangur, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Missiónsvikan verður 27.-30. mars.

**Missiónshúsið á Sandi**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

**Aglow, Sandoy**
Aglow dagur við landsleiðsluni verður í Samljóð leygardagin 15. mars kl. 10. Ókeypis døgurði. Tekning á tlf. 361156 ella 361126 innan mikud. 12. mars. Evni m.a. Hvat er Aglow. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Aglow, Suðuroy**
Møti verður á Tvøroyri leygarkvøldið kl. 20 í Café One Way. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Einki møti verður sunnukvøldið vegna missiónsviku í Porkeri.

**Bygdahúsið í Lopra**
Møti verður sunnukvøldið kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Vesturhøll, Fámjin**
Møti verður í kvøld kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Porkeri**
Felagskvinnumøti fyri alla oynna verður **leygardagin 5. apríl** kl. 16.00.
Fundur fyri ung verður í kvøld kl. 20.

**Missiónshúsið, Porkeri**
Missiónsvikan heldur fram leygarkvøldið kl. 20 Møti við Hjalgrim Davidsen.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Missiónsvikan byrjar týsdagin kl. 20 v/ Jónsvein Bech, presti og Hilmar Bech, og heldur fram vikuna út. Hjartaliga vælkomin.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Jesus stóð royndina*

Jesus varð borin í hendan heim sum heimsins frelsari.

Hansara gerningur í hesum heimi var og er at frelsa menniskjuna.

Jesu lív her á fold, øll hans ferð, orð og verk hansara hava sama endamal, at frelsa. Krossurin kom ikki óvart á Jesus. Hann sá hann allatíðina framman fyri sær. Og hann gekk alla tíðina framm ímoti honum.

Tað var ikki nakar léttur vegur at ganga fram ímoti krossinum. Hann valdi at verða líðin, at tæna og ikki at søkja sítt egna. Hettar var ikki lætt, men kostaði freisting og stríð. Men eftir hesum vegi vann hann sigur, tann størsta sum vunnin er. Og tí hevur Jesus vunnið rættin til okkum menniskju, ja rættin til at eiga okkum ráða yvir okkum.

Tí hevur Gud upphevjað hann og givið honum navnið yvir øllum nøvnum. Hann kom í heimin sum heimsins frelsari og tann tíðin hann stríddi ígjøgnum, stríddi hann menniskjunar vegna og tann sigur, hann vann, vann hann menniskjunar vegna.

Tríggjar ferðir møtti freistarin Jesusi í oyðimørkini. Á einum torni í halgidóminum á einum fjalli. Og hvørja ferð vísti Jesus freistaranum aftur við orðinum. Skrivað stendur Jesus fall ikki.

Sjálvi eru vit veit, men halda vit okkum nær at Jesusi, so vilh ann geva okkum sína hjálp.

Men sjálvt um vit fullu, og tað gjørdu vit so fota, so er tað gott at vita. At vit hava ikki ein høvuðsprest, sum ikki kann hava var kunnleika við veikleikum okkara, men ein sum er freistaður á allan hátt líka við okkum tó uttan synd.

Hann biður fyri okkum og hann veitir øllum sum vilja verða frelst, styrki í rættari tíð.

Amen

**Regin Høgnesen**

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 8.3. Eiði, tlf. 42 30 06
Sunnudagin 9.3. Fuglafjørður, tlf. 44 40 39

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.